


# Hesa løtuna draga øll eina línu

**Gerandishamurin verður tveittur, og fyrrapartin ólavsøkudag skuggar kenslan av samanhaldi og samvinnu fyri øllum ósemjum og stríði**

**Eyðun Klakstein**

Formliga er tað eingin ivi um, hvør partur av Ólavsøkuni er tann týdningarmiklasti.

Tað er bara tann parturin av ólavsøkuskránni, sum gongur fyri seg fyrrapartin ólavsøkudag, ið er ásettur í lóg. Løgtingssetan byrjar ólavsøkudag og heldur á til ólavsøkudag árið eftir, sigur stýrisskipanarlógin í grein 10, og har verður hildið fram:

Stk. 2. Ólavsøkudag ganga løgtingsformaður, løgtingsmenn, løgmaður, landsstýrismenn og embætismenn skrúðgongu úr tinginum í dómkirkjuna, har gudstænasta verður hildin, og síðan aftur í tingið. Løgtingsformaðurin ger av, hvørjir embætismenn eru við í skrúðgonguni, og hvussu gongan er skipað.

Stk. 3. Løgtingið verður sett aftur ólavsøkudag kl. 13.00.

Í níti árunum var tað um hesa tíðina ofta nógv tos og bæði politiskur og kirkjuligur turbolensur í sambandi við samansetingina av skrúðgonguni. Tað snúði seg eitt nú um, hvørjir skuldu ganga fremstir, hvar løgtingsformaðurin, sum sambært stýrisskipanarálitið er tann við størstu tignini, skuldi ganga, um løgmaður og bispur skuldu ganga lið um lið, og um prestarnir skuldu ganga saman við ella aftanfyri løgtingsmenninar og kanska saman við øðrum embætismonnum.

## Takksemi

Síðani 1998 hevur verið friður um skrúðgonguna. Hetta árið varð skrúðgongan skipað í trimum røðum. Harvið var pláss fyri løgtingsformanni, løgmanni og bispi í fremstu røð, og harvið fekk løgtingið sína røð, landsstýrið og embætisstættin sína røð og kirkjan sína røð, og soleiðis hevur tað verið síðani.

Tað stendur ongastaðni skrivað, at tey, sum eiga føroysk klæði, skulu vera í teimum, tá ið tey eru í skrúðgonguni, men tey flestu í skrúðgonguni eru í føroyska búnanum.

Tað er hesa løtuna, at allir føroyingar – uttan mun til alt annað – savnast fyri at fagna Føroyum og føroyingum, og tað er ikki frítt fyri, at takksemi kennist fyri, at tað untist okkum at vaksa upp í hesum landinum og at verða partur av føroysku tjóðina.

Tað kann vera, at vit ikki altíð draga eina línu, og at tað eru nógvar áskoðanir um, hvussu nógv kundi verið øðrvísi í Føroyum, enn tað er. Men tey flestu munnu kenna tað sum forrætt, at vit eru føroyingar serstøk tjóð, og tað er ikki minst fyrrapart ólavsøkudag, at hetta so ella so kemur til kennar.

Í fjør varð 100 ára føðingardagurin hjá høvuðsstaðnum markeraður við nýggjari kantatu hjá Sunleifi Rasmussen. Nú hon er 80 ára gomul, verður vent aftur til kantatuna, sum Edvard Mitens og Jógvan Waagstein skrivaðu í sambandi við 900 ára minningarhald um Ólav kong, ið fall á Stiklastøðum 29. juni 1030.

Kantatan og fosturlandssangirnir saman við sangarunum í tjóðbúnanum eru ímyndin av, at her savnast føroyingar, sum hava latið seg úr gerandishaminum og hesa løtuna draga eina línu í tøkk og virðing fyri, at tað fall teimum í lut at vera føroyingar.